# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | TH/MH |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## Tilnevning av limum í ráðið fyri gransking, menning og nýskapan

Við heimild í § 10, stk. 3 í Løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan verður ásett:

**§ 1.** Landsstýrismaðurin lýsir alment eftir uppskotum um limir til Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skal eisini heita á stjórnarráðini, Fróðskaparsetur Føroya og aðrar granskingarstovnar, Føroya Arbeiðsgevarafelag, og arbeiðstakarafeløgini um uppskot til ráðslimir.
*Stk. 3.* Tá ið lýst verður, skal dentur leggjast á at fáa inn grundað uppskot um ráðslimir, sum hava royndir við gransking, menning og nýskapan, bæði alment og vinnuligt og innanlands sum uttanlands.

**§ 2.** Í uppskoti sbrt. § 1, skal verða grundgivið fyri, hví viðkomandi persónur skal veljast í ráðið. Grundgevingin skal umfata eina lýsing av fakligum førleikum, viðkomandi royndum og persónligu eginleikunum hjá viðkomandi.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin setur trímanna nevnd at viðgera innkomnu uppskotini.
*Stk. 2.* Nevndin skal geva landsstýrismanninum tilmæli við í minsta lagi 10 nøvnum.
*Stk. 3.* Hevur nevndin fingið ov fá uppskot, ella metir nevndin, at ov fá av innkomnu uppskotunum eru skikkað at sita í ráðnum, kann nevndin sjálv skjóta upp fólk at sita í ráðnum.

**§ 4.** Landsstýrismaðurin tilnevnir, við støði í tilmælinum sbrt. § 3, stk. 2, ein formann og seks ráðslimir.
*Stk. 2.* Limirnir verða tilnevndir fyri fýra ár í senn og kunnu í mesta lagi tilnevnast fyri tvey skeið á rað.
*Stk. 3.* Fyrstu ferð ráðið verður tilnevnt, verða fýra limir tilnevndir fyri fýra ár, og tríggir limir verða tilnevndir fyri tvey ár.

**§ 5.** Um limur fer úr ráðnum í úrtíð, tilnevnir landsstýrismaðurin, við støði í tilmælinum sbrt. § 3, stk. 2, nýggjan lim, ið situr tað, ið er eftir av skeiðnum.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, xx. februar 2021

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinum